## Stjóri til

# Strandfaraskip Landsins

Strandfaraskip Landsins hava loyst frá landi í strembanini eftir at vinna sær ein nýggjan samfelagsligan leiklut. Til hetta krevst ein víðskygdur stjóri við góðari barlast. Høvuðsuppgávan hjá stjóranum verður at standa fyri flyting, umskipan og broytingum á stovninum í sambandi við, at høvuðsskrivstovan og fyrisitingin flyta til Suðuroyar 1. januar 2008, og at skipan við samferðslusáttmálum skal setast í verk 1. januar 2009.

Ein arbeiðsbólkur hevur gjørt tilmæli um framtíðar virksemi hjá Strandfaraskipum Landsins. Við støði í hesum tilmæli er avgjørt, at Strandfaraskip Landsins halda áfram sum landsfyritøka á fíggjarlógini. Skip og aktiv verða eins og í dag ogn hjá landinum, og Strandfaraskip Landsins halda áfram sum ein rakstrar- og ráðleggingareind. Virksemið hjá Strandfaraskipum Landsins skal ásetast í samferðslusáttmála við Innlendismálaráðið. Ein stórur partur av arbeiðinum hjá nýggja stjóranum verður at gera og røkja samferðslusáttmálar.

Tað er í stóran mun eitt verkætlanarstarv, har tað ræður um at duga at bróta upp úr nýggjum, hóast tað av og á brýtur í bæði borð. Umsøkjarar skulu hava breiðan førleika, eina holla ástøðiliga útbúgving og leiðsluroyndir frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum. Stjórin skal vera víðskygdur og ágrýtin, hava góð samstarvsevni og ein mennandi leiðslustíl.

Strandfaraskip Landsins eru ein stórur almennur stovnur við avgerandi týdningi fyri føroyska samfelagið. Í fjør fluttu Strandfaraskip Landsins 1,1 milliónir ferðafólk. Á stovninum, sum umfatar samanlagt 29 Bygda- og Oyggjaleiðir, starvast umleið 170 starvsfólk (120 fulltíðar størv). Samlaða játtanin til stovnin er umleið 110 milliónir krónur.

Starvið verður sett sum skjótast fyri eitt 5 ára skeið. Løn og setanartreytir eru sambært serligari avtalu við Innlendismálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Innlendismálaráðið. Rúna Joensen, aðalstjóra, ella Hilmar Høgenni, deildarstjóra, á tlf. 358080.

Umsóknir við CV, prógvum o.ø. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 23. mars 2007 kl. 12.00.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Innlendismálaráðið
Tinganes
Postboks 159
110 Tórshavn

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
Tel 35 80 80, Faks 35 80 85, Postboks 159
110 Tórshavn imr@imr.fo, www.imr.fo

Sansir.fo